TING-HELLAN

# Gary Snyder og umhvørvisvernd

**Niðanfyri standandi samandráttur er frá eini samrøðu við amerikanska yrkjaran, Gary Snyder, ið fór fram í 1991 og var stílað fyri av Don Swaim, ið er journalistur og rithøvundur, og hevur arbeitt við útvarpi meginpartin av sínum lívi. Samrøðan snýr seg um skógirnar í Norðuramerika, skógarídnaðin har og varðveitslu av friðaðum økjum**



Gary Snyder

UMHVØRVISVERND
*Dávid Isfeld*
*davidisfeld@hotmail.com*



Fyrst eitt sindur um yrkjaran: Gary Snyder var føddur 8. mei í 1930 í San Fransisko, Kalifornia. Hann hevur lisið mannfrøði (antropologi), enskar bókmentir, kinesiskt og japanskt. Yrkingar hansara snúgva seg ikki so nógv um umhvørvisvernd sum tær snúgva seg um náttúruna. Tað kemur týðiliga til sjóndar, at hann hevur drúgvar royndir og upplivilsir frá náttúruni, og skrivar hann tískil meiri um hvussu náttúran er háttað, hvussu hon livir og hvønn týdning hon hevur. Eisini leggur ein merki til hansara tokka til og virðing fyri náttúruni; ikki bert í Norðuramerika, har hann er uppvaksin, men kring allan heimin. Hansara kendasta yrkingasavn er óivað "Turtle Island" (1974), sum hann fekk Pulitzer virðislønina fyri.

## Frágreiðing um útlegging

Av tí at samrøðan varar ein góðan hálvan tíma, og inniber mong brot, har hugt verður nærri at yrkingunum, og onnur brot, ið eru friðing og umhvørvisvernd óviðkomandi, og upp aftur onnur ið eru fyri amerikanarar burturav, havi eg valt ikki at endurgeva samrøðuna orðarætt, men heldur umseta innihaldið og útleggja tað sum eina samanhangandi eind.

Niðanfyri standandi samandráttur er frá eini samrøðu við amerikanska yrkjaran, Gary Snyder, ið fór fram í 1991 og var stílað fyri av Don Swaim, ið er journalistur og rithøvundur, og hevur arbeitt við útvarpi meginpartin av sínum lívi. Samrøðan snýr seg um skógirnar í Norðuramerika, skógarídnaðin har og varðveitslu av friðaðum økjum.

## Samandráttur av samrøðuni

Fyrst í 1800 talinum í New England ruddaðu amerikanarar trøini fyri at fáa brenni og fyri at koma fram at málmi, koli og øðrum. Gary Snyder sigur, at sjálvt um trøini koma aftur (nøkur eru komin aftur), er tað ikki vist um træ-og vakstrargóðskan verður tann sama, sum hon upprunaliga var. Hetta má og skal takast hædd fyri, tá trø verða feld. (Rit. Viðm.: Tá ið trø verða burturbeind á ein hátt, har eitt heilt øki verður ruddað í senn, burturbeinist samstundis eisini grundarlagið hjá nógvum djórasløgum eins og plantusløgum - ein skógur er nevniliga ikki bert ein rúgva av trøum, ið eru savnað á einum staði, men eitt vistfrøðiligt búøki hjá plantum og djórum. Hesi djór og plantur eru við til at syrgja fyri einum góðum vakstrar- og trivnaðar-grundarlagið hjá trøunum; so tá trø verða plantað aftur, er tað gamla umhvørvið við plantum og djórum burtur, og vilja trøini tískil ikki trívast og mennast líka væl).

Stríðið ímóti skógarrudding skal ikki fremjast við at binda seg til ein bulldosara ella til eitt træ; ein skal fáa hendur á upplýsing og kunnleika, ið er betur enn tann hjá skógarídnaðinum, sum t.d. betri kort yvir økið, betri vistfrøðiligan kunnleika um skógirnar, skilja hvussu teirra telduskipanir virka, og arbeiða við skógarídnaðinum og vegleiða ídnaðin við teirri upplýsing vit hava, fyri at bøta um teirra telduskipanir. Skógarplanurin er skipaður við teldum og tølum, sum halda eyga við hvussu skógurin trívist (veksur, minkar), og um timburídnaðurin fer fram við skili og skynsemi.

Snyder nevnir eitt dømi, har fólkið við Miðjarðarhavið longu í 5. øld fyri Krist og frameftir, ruddaði so mikið av skógunum burtur, at hitin har turkaði jørðina upp í so stóran mun, at stór trø, sum t.d. eikitræið, komu ongantíð fyri seg aftur og eru nú burtur fyri altíð. Hetta hevur ein plantuvakstrar kanning víst; men tað eru tey fáu, sum vita av hesum.

## Um at virða

Ein stórur spurningur er: virða vit aðrar verur enn menniskja? Hví og hvussu? Svarið til "hvussu", er við lóggevingum um varðveiting sum t.d. "National Environmental Policy Act" (ein lóg í USA, sum Nixon forseti undirskrivaði í 1970, har í tað stendur, at umhvørvisvernd skal vera eitt ovaliga raðfest (prioriterað) mál). Spurningurin um "hví" samfelagið fremur slíka lóggeving, hvat er tilelvingin (motivatiónin), er truplari at svara. Eitt nú er ringt at skilja hví ein ikki má órógva eitt skógarøki vegna nakrar fáar uglir, tí sum Gary Snyder sigur, so skal landið/staturin mennast, og í tí tilgongdini verður ofta hugsað, at vit uttan ivað kunnu vera nakrar uglir fyri uttan; og leggur so afturat, at tað er trupult at argumentera ímóti slíkum sjónarmiðjum, tí øll ynskja framburð í samfelagnum. Snyder sigur, at um tað er trupult at fáa tað at geva meining við hesi varðveitslu, kann ein gera sum hann, og síggja ta náttúru ein er vaksin upp í sum sítt grannalag. Plantuvøksturin og djórini eru ein partur av okkum og vit eru ein partur av teimum. Ein hevur ongan rætt til at dálka ella oyðileggja grannalagið. (Rit. Viðm.: Ein hevur ábyrgd fyri sínum grannalagi. Tað er ikki eins egin ogn, men eitt stað ein hoyrir til saman við øðrum; og hetta gevur eina kenslu av felagsskapi og ábyrgd; ein verður góður við

